# Ársfrágreiðing fyri skúlaárið 2018/2018

Skúlaárið 2018-2019 er farið aftur um bak, og vit hyggja aftur á, hvat arbeiðið hjá skúlastýrinum hevur snúð seg um. Farna skúlaár hava 37 næmingar gingið í Viðareiðis skúla og starvsfólkini hava verið 6 í tali – ein námsfrøðiligur stuðul og 5 lærarar.

Skúlaárið byrjaði eins og hini árini við einum felags foreldrafundi 4. septembur, har foreldur fingu kunning um ársætlanina og annað fyri komandi skúlaárið, og ársfrágreiðingin varð løgd fram.

Skúlastýrini í Norðuroyggjum samstarva og møtast einaferð um árið at viðgera eitt evni ella ein problematik í skúlahøpi. Skúlastýrini skiftast um at skipa fyri einum økisfundi, og í ár var okkara túrur at bjóða inn til fund. Fundurin var 18. septembur í Viðareiðis skúla. Evnið, sum vit ynsktu at viðgera var dreingir og skúli. Hetta tí, at tað mangan vísir seg, at skúlin ikki kann bjóða dreingjum tað, sum teir hava áhuga í. Tað var formaðurin í javnstøðunevndini Ólavur Ellefsen, sum hevði fyrilesturin. Ein áhugaverdur fundur, har ymiskt var vent og draga, men sum hóast tað ikki kom við nakrari klokkuklárari loysn.

Spæliplássið við skúlan hevur verið ávegis í eina tíð, og loksins 25. mai, kundu skúlastýrið og kommunan bjóða bygdafólkinum at hátíðarhalda nýggja spæliplássið. Umframt, at røður vórðu hildnar, og snórur varð kliptur, so var Bubu eisini bjóðaður við, har hann undirhelt og skipaði fyri kappingum. Aftaná vóru øll boðin til ein drekkamunn í nýggju hølunum hjá frítíðaransingini í kjallaranum í skúlanum.

Skúlastýrið vil takka foreldrum, lærarum, stuðlum og starvsfólki annars fyri gott samstarv farna árið.
Vit byrja nú eitt nýtt skúlaár við nýggjum næmingum, nýggjum lærarum, nýggjum avbjóðingum og nýggjum møguleikum. Vit ynskja eitt gott, mennandi og læruríkt skúlaár fyri ein og hvønn, sum er knýttur at skúlagongdini í Viðareiðis skúla.

Vegna skúlastýrið
Gunrið Kallsberg, skúlastýrisforkvinna